# Ársins songrødd av bakkastokki um vikuskiftið

**Kappingin um at gerast ársins songrødd 2004 fer í gongd um vikuskiftið. Sera stórur áhugi er fyri at luttaka í kappingini, og kappingin er nærum fullteknað**

TÓNLEIKAKAPPING
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Tað eru okkurt um 25 ár síðani, at føroyingar av fyrstan tíð fóru undir at kappast um heitið sum ársins songrødd. Tey fyrstu árini var kappingin rópt ársins songfuglur, men seinni hevur tað broytt navn til ársins songrødd. Nú um vikuskiftið fer ársins kapping í gongd, og finalan verður sjálvan grundlógardagin 5. juni.

### Sera stórur áhugi

Fyrireikararnir av kappingini hava ongar trupulleikar havt av at fáa luttakarar til kappingina. Longu áðrenn farið var undir at lýsa við ársins kapping, hevði hópin av fólki teknað seg sum luttakarar. Mark Joensen, ein av fyrireikarunum, sigur, at gongdin seinnu árini hevur verið tann, at fólk tekna seg í heilt góðari tíð. Tað er bert til undanumfari í Suðuroy, at tað enn er pláss fyri luttakarum, meðan tað aðrastaðnis er yvirteknað, og tað kann merkja, at onkur luttakari í Havn verður fluttur til Suðuroyar, um ikki fleiri suðuroyingar tekna seg.

Mark Joensen sigur eisini, at tað gleðiliga er hent, at miðalaldurin á luttakarunum er vaksandi. Fyrr var sagt, at tað bert vóru hálvvaksin, sum tóku lut, men nú er vend komin í. Aldursmarkið fyri at luttaka í ársins songrødd er 14 ár, og Mark Joensen sigur, at í ár eru luttakararnir millum 14 og 36 ár. Býtið millum konufólk og mannfólk hevur altíð verið so, at ein stórur meiriluti hevur verið konufólk, men menninir gerast fleiri og fleiri í tali, sigur Mark Joensen. Í ár er okkurt um triði hvør luttakari mannfólk.

Tað hevur eisini bøtt um umstøðurnar hjá luttakarunum, at teir nú kunnu velja frítt, hvat fyri sang teir vilja syngja, har mann fyrr bert hevði ein avmarkaðan lista at velja burturúr.


*Tey bæði, Jákup Jacobsen og Elin í Stórustovu, verða frásøgufólk til kappingarnar um ársins songrødd kring landið*
*mynd: Finnur Justinussen*


*Tað verður DJ Switch, ið fer at taka sær av diskotekinum í sambandi við kappingina um at gerast ársins songrødd 2004*
*mynd: Finnur Justinussen*

### Góðir karmar

Nógv verður gjørt burturúr í sambandi við kappingina. Fyrireikararnir hava við góðari hjálp frá Tórshavnar Skipasmiðju og Føroya Banka fingið ein nýggjan yvirbygning til pallin, sum fer at seta sín heilt serliga dám á kappingina. Haraftgurat hava fyrireikararnir fingið nýtt og størri ljóðanlegg, ið neyvan hevur sæð sín líka í Føroyum, og saman við einum stórum ljósshowi fer tað at gera sítt til, at umstøðurnar til ársins kapping verða í topp. Umframt sjálvar sangframførslurnar verður diskotek, sum DJ Switch tekur sær av, í sambandi við undanumførini, og summastaðnis verður eisini skipað fyri mótasýningum.

Tey fimm undanumførini verða býtt soleiðis, at tvey verða í Havn, tvey í Eysturoynni og eitt í Suðuroy. Tað verða tey bæði, Elin í Stórustovu og Jákup Jacobsen, ið fara at verða frásøgufólk til kappingarnar. Vinnarin av ársins songrødd fær ein kekk áljóðandi 10.000 krónur, nummar tvey fær 5.000 krónur, meðan nummar trý fær 3.000 krónur.




**Kvøldvirksemið**

**Málbólkur**
Ætla avlamisfólki, ið hava fingið tillutað miðal ella hægstu pensjón, ið hava tørv á at koma saman við øðrum og eisini kunnu virka eitthvørt lætt ítriv, sum møguliga kann seljast.

**Endamál**
At geva fólki møguleika at møtast við øðrum, fyri at fáa ein meira innihaldsríkan og stimbrandi dagligdag. Og soleiðis eisini fyribyrgja einsemi og dapurskygni hjá avlamisfólki.

**Sjálvsognarstovnurin ALV**
*Smiðjugerði 6, kj.*
*Boks 301*
*110 Tórshavn*
*Tlf.: 35 00 70*
*Fax: 35 00 71*
*t-post: alv@alv.fo*

***Tilfar og umsóknarbløð fáast við at venda sær til Sjálvsognarstovnin ALV!***

SetHúsaSølan
Smápartafelagið SHS · tórsgøga 16
postbox 3156 · 110 tórshavn
e-mail: sethusas@post,olivant.fo
heimasíðan: www.sethusasolan.fo



**Sethús í Tórshavn**

Eini stór væl bygd kvalitetshús í Havn, liggja nær býnum í góðum umhvørvi og við frálíkum útsýni.

**Grundøki** er 931 fermetrar og húsini eru 330 fermetrar í gólvvídd í 3 hæddum:

**Kjallari:** Stórt hobbyrúm (billard), vaskirúm, baðirúm v/sauna, stórt fýrrúm og garaga.
**Stovuhædd:** Spísikøkur og hjallur, 3 ljósar samanhangandi stovur, wc.
**Loftið:** 5 sovikømur og 2 baðirúm.

Ognin er væl hildin og verður víst fram eftir avtalu.
**Prísuppskot:** 2.675.000

**avgreiðslutíðir:**
kl. 10-13 á tel. 210 252
& kl. 14-17 á tel. 320 252
**skrivstovan er opin:**
mánadag-fríggjadag kl. 14-17

Sosialurin



Løgmaður:

# Hernaðarpolitikkurin á føroyskar hendur

**– Føroyingar skulu nú hava fult innlit í og ávirkan á uttanríkaspolitisku hernaðartrygdina kring Føroyar, og gomlu hernaðarsamtyktirnar undir kalda krígnum mugu skiftast út, sigur Jóannes Eidesgaard løgmaður. Nýtt uppskot um økt føroyskt frælsi á hernaðarøkinum skal samtykkjast í tinginum í næstum eftir fundir við donsku stjórnina**

TRYGDARPOLITIKKUR
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*

Higartil eru fýra uttanríkispolitiskar hernaðarsamtyktir settar í gildi í Føroyum, men nú skal broytast og moderniserast á økinum. í kjalarvørrinum av nýggja uppskotinum um trygdarpolitikk, sum skal til fyrstu viðgerð í tinginum í næstu viku, vísir løgmaður á, at føroyingar nú skulu hava fult innlit í og ávirkan á tey uttanríkispolitisku trygdartiltøk, sum verða framd í føroyskum øki. Áðurnevndu hernaðarsamtyktir, sum nú eru í gildi, eru framdar í tíðarskeiðnum millum 1940´ini og 80´ini, og metir løgmaður tað vera átroðkandi at endurnýggja ótíðarhóskandi og gomlu lógirnar.


*– Avgerðirnar kring t.d. Sornfelli og Mjørkadal vórðu tiknar av dønum, uttan at føroyingar á nakran hátt høvdu ávirkan, og táverandi Føroya løgmaður varð bert kunnaður um tær avgerðir, danir tóku um Føroyar, sigur Jóannes Eidesgaard*

### Yvirgangur er nýggja spøkilsið

Jóannes Eidesgaard vísir fyrst og fremst á, at vit liva í einum grundleggjandi nýggjum heimi samanborið við tíðina, tá núverandi galdandi hernaðarsamtyktir vórðu settar í gildi.

– Hesar samtyktir eru framdar undir kalda krígnum, tá umstøðurnar við t.d. NATO og Warschawa-avtaluni vóru grundleggjandi øðrvísi enn nú, og tískil má øki moderniserast við útgangsstøði í nýggja heiminum, vit í dag liva í, sigur løgmaður. Hann vísir á, at heimsumfatanandi yvirgangurin í 2004 er nýggi uttanríkispolitiski og hernaðarligi høvuðstrupulleikin, sum hevur avloyst hættisligu hóttanirnar undir kalda krígnum í fremmandagjørda, fíggindagjørda og tvíbýtta heiminum.


*– Nýggja uppskotið um føroyskan trygdarpolitikk, sum danir taka undir við, gevur okkum størri avgerðarrætt á økinum, og krevja vit fult innlit í øll tey mál, sum á ein ella annan hátt ávirka okkum, slær Jóannes Eidesgaard løgmaður fast*

### Hernaðarstrategisk lyklastøða

Nýggja uppskotið inniber í stuttum, at føroyingar mótvegis farnum tíðum skulu hava ávirkan á og innlit í tær avgerðir, sum viðkoma Føroyum og verða framdar í føroyskum øki, sum hevur verið ein týdningarmikil strategisk farleið í hernaðarpolitiskum høpi. T.d. hevur NATO mett tað vera alneyðugt at hava verjustøðir í Føroyum til tess at tryggja eftirlitið við havleiðunum og loftrúminum millum Hetland og Ísland. Hetta var høvuðsleiðin hjá máttmikla sovjetiska norðurherflotanum út í Atlantshav, har Sovjetsamveldið hevði ætlanir um at kvetta sambandið millum Vesturevropa og Norðuramerika.

– Avgerðirnar kring t.d. Sornfelli og Mjørkadal vórðu tiknar av dønum, uttan at føroyingar á nakran hátt høvdu ávirkan, og táverandi Føroya løgmaður varð bert kunnaður um tær avgerðir, danir tóku um Føroyar, sigur Jóannes Eidesgaard. Sambært løgmanni skal nýggja løgtingsuppskotið tryggja, at eingin avgerð verður tikin uttan um føroyingar.

– Hóast hernaðarmál er eitt felagsmál, gevir nýggja uppskotið um trygdarpolitikk føroyingum størri avgerðarrætt á økinum, og krevja vit fult innlit í tey mál, sum á ein ella annan hátt ávirka okkum, slær løgmaður fast.

### Danir stuðla uppskotinum

Tá økið ikki er føroyskt málsøkið burturav, krevst sjálvsagt, at danir stuðla og taka undir við uppskotinum, og higartil hevur løgmaður fingið tað fatan, at danir eru villigir at samstarva um nýggja uppskotið.

– Eg havi verið á fundi við bæði danska forsætisráðharran og danska uttanríkismálaráðharran í sambandi við nýggja verjupolitiska uppskot okkara, har vit vístu á, at landsstýrið metir tað vera umráðandi fyri Føroyar at umboða seg sjálvar í egnum málum, meðan vit fáa innlit og møguleika at ávirka avgerðirnar í felagsmálum, sum viðvíkja Føroyum, sigur Jóannes Eidesgaard. Bæði danski forsætisráðharrin og uttanríkisráðharrin søgdu seg skilja føroysku sjónarmiðini, og semja er um, at heimastýrislógin ikki gevur slíkar heimildir. Tískil verður arbeitt í samstarvi millum Føroyar, Danmark og Grønland at fyrireika lógaruppskot, ið skal áseta eitt annað uttanríkispolitiskt heimildarbýti, har Føroyar (og Grønland) skulu fáa munandi størri virkisfrælsi.

– Danski verjumálaráðharrin hevur eisini fyri stuttum víst á, at eingin avgerð verður tikin uttan um føroyingar, sigur Jóannes Eidesgaard, sum sær fram til broytingar og moderniseringar í føroyskum verjupolitikki.

Løgmaður undirstrikar, at uppskotið verður samtykt av samgonguni. Uppskotið, sum skal broyta føroyskan uttanríkis-, trygdar- og verjupolitikk, skal til fyrstu viðgerð í næstu viku.

## Ikki Alinson men Himes

Í grein um Statoil og Føroyaøkið mikudagin kom eitt navn skeivt fyri.

Maáurin blaðið tosaði við var ikki Gareth Alinson men Gregory Himes, sum er varaforseti fyri altjóða leiting hjá Statoil. Umberið okkum mistakið.

**Blaðm.**